# ítróttur

Nr. 182 • leygardagur • 24. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


TB-GÍ:

# Lagnudystur á Sevmýri

**Av Tvøroyri eru boðini greið. Tað einasta, sum telur sunnudagin móti GÍ, eru trý stig. Hvørki meira ella minni**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Talan verður um kanska mest týðandi dystin á árinum hjá heimaliðnum, tá teir sunnudagin taka ímóti GÍ. Ein sigur her kann av álvara aftur skapa spenning um niðurflytingina. Men hinvegin vil eitt møguligt tap hava at kalla øvutu ávirkanina*

Tað er nú ella ongan tíð, tá TB sunnudagin tekur ímóti GÍ. Við fýra umførum eftir at spæla og fimm stigum upp til bjargingina, er eingin sum helst ivi um, at treytirnar hjá TB eru bæði greiðar og harðar. GÍ er eitt av veikaru liðunum í deildini, og so skulu trý stig á kontina.

- Tað sigur seg sjálvt. Hetta er tað, sum vit rópa fyri »knald eller fald«, sigur Hallur Christiansen, sum helst verður ein av TB-spælarunum á vøllinum sunnudagin.

- Tekur tú teir dystirnar, sum eru eftir, so eru nakrir lykladystir eftir. Men uttan ein sigur sunnudagin, kunnu restin sum so gera tað sama. Tí er eingin sum helst ivi um, at vit leggja alla orku í dystin nú sunnudagin.

Og verður tað so eisini eitt meira framrættað TB-lið, sum vit nú koma at síggja, sæð í mun til kontra-spælið, sum tit ofta hava dúvað uppá.

- Tað verður tað kanska. Vit hava í øllum fyrireikað okkum so væl sum gjørligt til dystin. Og ein javnleik kunnu vit í øllum førum ikki brúka til nakað sum helst. So vit fara í øllum førum fram á vøllin. Men hinvegin haldi eg eisini, at vit aloftast hava spælt hampuliga framrættað her á Sevmýri, men tað er tíverri alt ov ofta, at vit hava havt marginalarnar ímóti okkum.

Hallur sigur annars, at einasti spælarin, sum við vissu ikki verður við, er leikbannaði Jón Johannesen. Dan Mortensen var ikki við, tá TB mikudagin tapti fyri EB/Streymi á Mølini, men sum skilst, so er ein vón fyri, at hann verður tøkur til týdningarmikla dystin.

### Finala hjá GÍ

Hjá GÍ er støðan ikki nógv mætari, enn hon er hjá TB.

- Vit skulu so í øllum førum ikki tapa handan dystin. Gera vit tað, so koma vit av álvara í vanda, heldur Sámal Joensen.

- Í so máta kanst tú gott siga, at tað er ein sannur finaludystur hjá okkum hesaferð.

Hann sigur, at GÍ enn má vera skadda Poul Arna Jacobsen fyriuttan, og at Robert Rzezycki eisini er leikbannaður. Hinvegin er Hans Jørgen Djurhuus nú aftur tøkur, eftir at hann hevur sitið tveir daga leikbann av sær.

# Trupult hjá Skála við Løkin

| | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KÍ/F | - | 3-2 | - | - | - | - | 4-1 | 2-0 | 0-1 | 5-1 | - | 4-0-1 | 14-5 |
| HB-VB | - | 2-1 | 0-0 | 3-0 | 2-1 | 2-2 | 2-0 | 5-1 | 1-2 | 1-2 | 2-0 | 6-2-2 | 20-9 |
| NSÍ-Skála | 1-0 | 2-0 | 2-0 | 3-1 | - | - | - | - | - | - | - | 4-0-0 | 8-1 |
| TB-GÍ | 3-0 | - | - | 0-3 | - | - | - | 3-1 | - | 0-3 | 1-0 | 3-0-2 | 7-7 |
| EB/S-B36 | - | 0-2 | 3-1 | 1-1 | 0-2 | - | - | - | - | - | - | 1-1-2 | 4-6 |

*Talvan sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í bestu deildini í tilsvarandi uppgerðunum seinastu tíggju árini*

Sambært hagtølunum, so skal Skála ikki rokna við nøkrum serligum, tá teir sunnudagin vitja hjá NSÍ. Tí hóast Skála tey bæði seinastu árini hevur vent flestu hagtølum, so hava teir í Runavík enn ikki givið skarvin yvir. Í øllum førum ikki á heimavølli.

Í aðrar mátar tykist talan fleiri staðni skula vera um spennandi uppgerðir, tó at serliga KÍ hevur havt gott tak á, tá ÍF vitjar, umframt at HB eisini hevur knógva VB tær flestu ferðirnar.

Hinvegin, so skulu dystirnir spælast, áðrenn stigini skulu býtast millum partarnar, og tó at hagtølini kunnu vera stuttlig at lesa, so hava tey enn ikki avgjørt nakran dyst.

HB-VB:

# Kulic er út

**Meistararnir úr HB skulu hava trý stig, um teir skulu halda fram í gullstríðnum, meðan tað hjá skerdu vágbingunum ræður um at bjarga tí, sum bjargast kann**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Hóast tað hevur verið soleiðis upp og niður hjá meistarunum úr HB í ár, so er liðið framvegis partur av oddastríðnum. Og síðani venjaraskiftið tykist pílurin hjá bæði liði og áskoðarum at hava peiggjað rætta vegin.

Sunnudagin er tað VB, sum er mótstøðuliðið, og einki er at ivast í, at HB ætlar sær øll stigini hesaferð. Stig, sum eisini eru neyðug, um trífaldu meistararnir aftur í ár vilja vera við í gulldystinum.

Hjá HB er Hallur Danielsen leikbannaður, eftir at hann seinast fekk fimta gula kortið á kontina. Hinvegin røkist fyri, at Hans á Lag nú aftur er tøkur eftir skaða, og tað sama verður sagt um Tór-Ingar Akselsen.

Hjá VB er stóri trupulleikin, at Milan Kulic ikki er tøkur. Hann varð snøgt sagt niðursligin á opnari gøtu í Reykjavík, tá VB seinasta vikuskifti vitjaði vinarfelagið, Reynir, og hósdagin varð hann lagdur undir skurð fyri brot í nøsini. Hesa ferð verður hann so ikki við, men roknað verður tó við, at týdningarmikli miðvallarin verður tøkur til seinastu tríggjar dystirnar á árinum.

EB/Streymur-B36:

# Gullið fyri framman

**Hóast møguleikin bara er teoretiskur, so halda teir hjá EB/-Streymi seg til møguleikan, sum tó bert er ítøkiligur, um teir vinna hvørja ferð**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at EB/-Streymur er form-sterkasta liðið í Formula-deildini í løtuni. Fimm av seks teimum seinastu ferðunum hava teir fingið øll stigini við sær, og teir ætla sær ikyuiki, at sunnudagin skal verða nakað undantak í so máta.

Til dystin hesaferð verður roknað við, at talan verður um stórt sæð sama fólk, sum var við móti TB. Tað vil siga, at Knút Vesturtún enn ikki er komin fyri seg, og at Jákup Martin Joensen aftur er við í hópinum, tó at hann neyvan byrjar inni.

Hinvegin er eitt lítið ivamál við Bárði Olsen. Hann fekk ein snudd í knæið móti TB, og tá vit frættu úr EB/Streyma-leguni, var framvegis ivasamt, hvørt hann var tøkur sunnudagin.

Hjá B36 tykist einasta fráveran vera Bergur Midjord, sum fekk tveir daga leikbann eftir hendingina á Sevmýri. Klæmint Matras hevur drigist við vøddaskaða seinastu tíðina, men roknað verður fyri vist, at hann verður tøkur hesaferð.

# Hans Pauli kanska klárur

Tað er einki at ivast í, at talan var um dyggan smeit, sum EB/Streymur fekk, tá Hans Pauli Samuelsen fyri trimum vikum síðani breyt beinið undir venjing.

Brotið var tó sera reint, og tá hann hósdagin var til røntgen-kanningar, vóru boðini somikið positiv, at tað nú røkist fyri, at hann kann verða á vølli aftur hetta kappingarárið.

Sum skilst, so er gipsið nú skift um við tunnan skinnara, og tá hesin væntandi verður tikin av um tvær vikur, kann venjingin aftur byrja. Og so er tað væl hugsandi, at EB/-Streymur til ta tíð hevur ein jokara av høgum kalibri sitandi á beinkinum.

**-mørk**